

**PEUGEOT 307 2,0 HDI** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: UR 249 — KM: 96.000
Árgangur: 26.03.03 — Seinast sýnaður: 26.03.03

Kr. 135.000,-



**TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: KF 365 — KM: 98.000
Árgangur: 01.03.00 — Seinast sýnaður: 20.02.06

Kr. 98.000,-



**DAEWOO LANOS 1,3** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: RT 084 — KM: 97.000
Árgangur: 10.05.99 — Seinast sýnaður:

Kr. 28.000,-



**TOYOTA YARIS T-SPORT** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: KH 071 — KM: 62.000
Árgangur: 03.10.01 — Seinast sýnaður: 03.03.05

Kr. 105.000,-



**NISSAN ALMERA 1,8** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: VK 897 — KM: 73.000
Árgangur: 27.06.02 — Seinast sýnaður: 01.03.06

Kr. 115.000,-



**TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: TE 104 — KM: 64.000
Árgangur: 24.08.00 — Seinast sýnaður: 01.06.05

Kr. 89.000,-



**HYUNDAI GALLOPER** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: AR 390 — KM: 105.000
Árgangur: 28.05.99

Kr. 98.000,-



**TOYOTA COROLLA VERSO 1,8 VAN** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: LA 068 — KM: 4.800
Árgangur: 25.01.06 — Seinast sýnaður: 25.01.06

Kr. 158.000,-



**TOYOTA COROLLA 1,6 TERRA** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: SU 919 — KM: 57.000
Árgangur: 23.10.02 — Seinast sýnaður: 01.12.05

Kr. 135.000,-



**TOYOTA CARINA E 2,0 GLI** — 6 mánaða garanti

Skrásetingarnr.: F 51385 — KM: 156.000
Árgangur: 15.03.95 — Seinast sýnaður: 01.10.05

Kr. 54.000,-

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, í eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

# TÍÐINDI

# Stuttligur fólkafundur á Doktaragrund

**Nógv fólk var aftur í ár komið saman á Doktaragrund, tá Unga Tjóðveldi skipaði fyri fólkafundi, og aftur í ár rungaði láturin millum húsini út Reyni**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*George W. Bush kom á Doktaragrund væl vardur av lívverjum*
*Mynd: Niels Uni Dam*



*Tórbjørn Jacobsen kallaði m.a. løgmann fyri eina danska jukeboks*
*Mynd: Niels Uni Dam*

Fólkafundurin á Doktaragrund hjá Unga Tjóðveldinum gjørdist sera stuttligur úr enda í annan, við fýra so ymiskum monnum á røðaralistanum sum Tórbjørn Jacobsen, Carl Johan Jensen, George W. Bush og Høgna Hoydal var talan um eina sera undirhaldandi løtu, fyri teir nógvu áhoyrarnar.

Tórbjørn Jacobsen legði fyri við røðu, ið var ein útbygd útgáva av kantaturøðuni, ið vegna streymslit ikki hoyrdist á Tinghúsvøllinum. Skemtiligi tingmaðurin úr Eysturoynni helt fyri, at nú fasistarnir í SEV høvdu sløkt fyri streyminum fyri at forða honum í at vera hoyrdur, mátti hann taka aftur í aftur røðuna. Henda útgáva var tó mundandi meiri eksplosiv. Eins og grønlendski kolleg-ain hjá Tórbirni segði um grønlendarar fyri fáum vikum síðan, segði Tórbjørn í røðuni, at Føroya fólk leið av Stockholmssyndrominum. Eisini varð løgmaður kallaður ein trivalig donsk jukeboks.

Carl Johan Jensen las tragikomiska monologin, ið hann hevði skrivað til bókmentaløtuna á G!. Sum vant var talan um orðaspæl í heimsflokki, og áhoyrararnir máttu gera sær ómak fyri at skilja monologin, men hetta gjørdi ikki so nógv, tí tað sum vit skiltu var stuttligt.

Stuttligasta innslagið átti tó sjónleikarin Jóannes Lamhauge, ið framførdi eina frálíka George W. Bush herming. Við lívverjum kom Bush yngri á Doktaragrund, og láturin tagnaði ikki, fyrr enn hann fór aftur væl vardur av lívverjum. Hann skeyt m.a. upp, at Tinganes varð gjørt um til ein McDonalds, soleiðis at allir hesir klænu føroyingarnir fingu eitt sindur av amerikanska fitanum.

Høgni Hoydal átti síðstu orðini, og formaður Tjóðveldisfloksins hevði eisini skemt við í røðuni, tá hann samanbar føroyska politiska pallin við "Fínt skal tað vera", m.a. var Jóannes Eidesgaard Hyacint Javnaðarflokkurin ræðsluslignа grannakonan Elisabeth, Fólkaflokkurin Sheridan og Tjóðveldisflokkurin Onslow, Jóhan Dahl var sjálvandi senili pápin, ið royndi at rýma, men hvørja ferð skjótt var fangaður og læstur inni aftur.

Millum røðurnar spældi Uni Debess løg, ið hann hevði skrivað til yrkingar hjá langabba sínum Nyholm Debess. Talan var um vøkur fólkatónleikakend løg, ið tó vóru merkt av vanliga blúsandanum, ið Uni hevur gjørt sín egna.


Stórt úrval av bátum
Vitja okkum í Vestmanna



STUBBIN Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo www.stubbin.fo